## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen greiður frá um veðrið




**Veðrið í morgin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av vestri og yvirhøvur turt og sólglottar, menn út á seinnapartin veksur hann vindin upp í hvassan vind av útsynningi og regn. Hitin millum 5 og 8 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av útsynningi, seinnapartin veksur hann vindin upp í skrið av vestri. Ælingur, sum fráliður kavi og hitin millum 2 og 5 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Strúkur í vindi ella hvassur vindur av vestri og kavaælingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 1 og 4 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av vestri og ælingur, partvís kavi, men eisini sólglottar. Hitin millum 1 og 5 stig.

# Nýggj føroysk fyritøka roynir seg í Kina

**NÝBROT**
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

Tað er alt meira vanligt, at eitt nú evropearar taka upp samstarv við kinesiskt vinnulív og myndugleikar. Hesa gongdina síggja vit eisini í Føroyum. Herfyri stovnaðu Tróndur Djurhuus og Michael Reviel fyritøkuna Rainmaker Partners. Rainmaker eiga í dag í eini fyritøku í Beijing saman við einum kinesiskum stjórnarstovni og arbeiða í løtuni við at seta enn eina fyritøku á stovn saman við einum øðrum stjórnarstovni. Tróndur Djurhuus, stjóri fer á Kinatiltaki í Miðlahúsinum í kvøld at greiða frá, hví Rainmaker hava valt Kina, og í hvønn mun spurningurin um mannarættindini hevur nakra ávirkan.

Rainmaker Partners er ein fyritøka, sum arbeiðir við tí, sum tey aðrastaðni rópa 'Business Development' - tvs. at byggja nýtt virksemi upp í samstarvi við partnarar, bæði fyritøkur, fíggingarstovnar og íverksetarar. Tróndur Djurhuus sigur í stuttari viðmerking til hetta nýggja virksemi hansara:

-Nógv hevur verið tosað um, at okkum nýtist fleiri vitanargrundaðar hálønarvinnur. Okkara útgangsstøði er, at vit í Føroyum og Norðuratlansthavi mugu fokusera á tað, sum eru okkara kjarnuførleikar - kanska serliga á sjóvinnuøkinum. Vit mugu samstundis samstarva við framstandandi altjóða vinnulívsfólk, sum hava drúgvar royndir í verkætlanum tvørtur um landamørk.



*Tróndur Djurhuus, sum nú roynir eydnuna í Kina saman við Michael Reviel.*

Harafturat er neyðugt, at vit frá byrjan byggja okkum upp góð sambond við stórar og vaksandi marknaðir, sum eru viðkomandi fyri okkara kjarnuførleikar- Føroyar og Norðuratlantshav eru sera smáir marknaðir og tí tungir at hava sum heimamarknaðir. Vit royna tí at byggja upp Kina sum heimamarknað - av fleiri orsøkum.

# Tiltak um Kina í
## Miðlahúsinum í kvøld

**8. august byrja Olympisku Leikirnir í Beijing. Talan verður uttan iva um eitt stórfingið og bergtakandi tiltak. Men í skugganum av OL fyrireikingunum fara álvarslig mannarættindabrot fram. Amnesty International ynskir at gera heimin varugan við hesi mannarættindabrot. Tí skipar Føroya deild fyri einum tiltakið um Kina týsdagin 19. februar klokkan 20.00 í Miðlahúsinum.**

*Guðrið Hansdóttir fer at spæla.*

**Framløgurnar verða:**
Elin Mortensen, samskipari í Amnesty International, Føroya deild, fer at siga frá, hvussu stendur til við mannarættindastøðuni í Kina.

Birita Ludvíksdóttir, løgfrøðingur, fer at knýta tey mannarættindabrot, sum fara fram í Kina, saman við heimsyvirlýsingini hjá ST. Eisini fer hon at siga meiri alment frá týdninginum av altjóða lóggávu.

Øssur Winthereig, journalistur, fer at hugleiða um ábyrgdina hjá fjølmiðlafólki at seta kritiskar spurningar. Yvirskriftin er: Onki er fríða - heldur ikki arbeiði hjá mannarættindafelagsskapum sum Amnesty.

Tróndur Djurhuus, stjóri í Rainmaker Partners. Rainmaker eiga í dag í eini fyritøku í Beijing saman við einum kinesiskum stjórnarstovni og arbeiða í løtuni við at seta enn eina fyritøku á stovn saman við einum øðrum stjórnarstovni. Tróndur fer at greiða frá, hví Rainmaker hava valt Kina, og í hvønn mun spurningurin um mannarættindini hevur nakra ávirkan.

**Øll eru hjartaliga vælkomin.**

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | -18 |
| Nuuk | 0 |
| Qaqortoq | 1 |
| Ammassalik | -2 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 3 |
| Seyðisfjørður | 1 |
| Tórshavn | 4 |
| Lerwick | 6 |
| Aberdeen | 4 |
| London | 10 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 4 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 6 |
| Keypmannah. | 4 |
| Helsinki | -1 |
| Moskva | -2 |
| Berlin | 5 |
| Warzawa | 3 |
| Kiev | 0 |
| Bukarest | 1 |
| Paris | 9 |
| Madrid | 9 |
| Róm | 12 |
| Malorca | 13 |
| Athen | 9 |
| Malta | 12 |
| Tunis | 15 |
| Beijing | 6 |
| New Dehli | 20 |
| Bangkok | 30 |
| Jakarta | -- |
| Sydney | -- |
| New York | 11 |
| Miami | 21 |
| Los Angeles | 12 |
| Meksikobýur | 20 |
| Panama | 31 |
| La Paz | 13 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 27 |

## LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár:**
Eitt lágtrýst, 985 hPa. yvir Grønlandsfjørðinum fer spakuliga í landnyrðing og kuldabrúgvin haðani verður yvir Føroyum mikunáttina.



**Í dag:**
Lágtrýstið vestan fyri Ísland fer í landnyrðing og brúgvalagið haðani verður yvir Føroyum mikukvøldið

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 14/2 kl. 06⁰⁰ – 15/2 06⁰⁰. Hitin í gjár: 6,2°
Minsti hiti máldur í februar: -11° - Mesti hiti máldur í februar: 11°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 2,0 mm – mált frá 12/2 kl. 06⁰⁰ – 13/2 06⁰⁰.
Avfallið higartil í februar: 38 mm

## Tiltøk í Miðlahúsinum

**19. februar**
***Amnesty International (OL í Kina)***

**21. februar**
***Yggdrasil/Jazzfelagið***

**22. februar**
***Yggdrasil/Jazzfelagið***

**FØROYABANKI**
*stuðlar tiltøkum í Miðlahúsinum*

Alt um harmonikur



www.simme.eu

## VESTFALLSKYRRINDI

14. feb. Fyrra kvarter / mánin næstur jørðini
21. feb. Fullmáni
28. feb. Mánin longst frá jørðini

Kelda. Álmanakkin 2007

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 19. feb. | 05.11 | 17.36 | 04.11 | 16.36 | 04.26 | 16.51 | 07.11 | 19.36 | 08.11 | 20.36 | 03.26 | 15.51 | 02.26 | 14.51 | 05.26 | 17.51 | 06.26 | 18.51 | 04.56 | 17.21 | 06.11 | 18.36 |
| 20. feb. | 06.01 | 18.23 | 05.01 | 17.23 | 05.16 | 17.38 | 08.01 | 20.23 | 09.01 | 21.23 | 04.16 | 16.38 | 03.16 | 15.38 | 06.16 | 18.38 | 07.16 | 19.38 | 05.46 | 18.08 | 07.01 | 19.23 |
| 21. feb. | 06.45 | 19.07 | 05.45 | 18.07 | 06.00 | 18.22 | 08.45 | 21.07 | 09.45 | 22.07 | 05.00 | 17.22 | 04.00 | 16.22 | 07.00 | 19.22 | 08.00 | 20.22 | 06.30 | 18.52 | 07.45 | 20.07 |
| 22. feb. | 07.30 | 19.51 | 06.30 | 18.51 | 06.45 | 19.06 | 09.30 | 21.51 | 10.30 | 22.51 | 05.45 | 18.06 | 04.45 | 17.06 | 07.45 | 20.06 | 08.45 | 21.06 | 07.15 | 19.36 | 08.30 | 20.51 |
| 23. feb. | 08.13 | 20.32 | 07.13 | 19.32 | 07.28 | 19.47 | 10.13 | 22.32 | 11.13 | 23.32 | 06.28 | 18.47 | 05.28 | 17.47 | 08.28 | 20.47 | 09.28 | 21.47 | 07.58 | 20.17 | 09.13 | 21.32 |